**HEIMABIOGRAFUR**
DVD avspælari, 5 hátalarar + subwoofer spæla 200 watt tilsamans. Kann spæla DVD CD Mp3 osv. Til sølu fyri 2.200 kr.
*Tlf. 269294*

**PARABOL**
Móttakari av merkinum Amstrad analogur v/80 cm. parabolskál til sølu fyri kr. 300,-
*Tlf. 228367*

**TIL SØLU**
Matrix modul sum kan brúkast til canal digital og ymiskt annað. Passar til flestu parabolkassar til sølu fyri 900 kr.
*Tlf. 745101*

## Ymiskt

**GOTT TOMBOLA**
og kaffisøla verður í Glæmuni í Kvívík leygardagin 6. novembur kl 16 til frama fyri gøtubørn í Kiev. Eisini verða lutaseðlar seldir fyri 5 kr stk. Høvuðsvinningur er ein vikuskiftisflogferð frá Atlantic Airways. Skriva navn og tlf. á nittirnar og verð við i dráttinum um ein góðan vinning. Øll eru vælkomin.
*Sunnudagsskúlin*

**SUNDA PENSIONISTAFELAG**
Hugnakvøld verður í Eydnuni á Oyrarbakka mánakvøldið 8. nov. 2004 kl. 19.00.
*Nevndin*

**MARKNAÐARDAGUR**
verður í Ítróttarhøllini í Runavík 27. nov. Tilmelding á tlf. 447655.
*NSÍ*

**FRÁ KAGGANUM**
Ræstkjøtaveitslan fyri limum við maka verður í Kagganum leygarkvøldið 13. nov. kl. 19. Tilmeldingarlistin liggurí barrini. Gjaldast skal við tilmelding.
*Kaggin*

**DISCMAN**
Sony-Discman, brúktur eina ferð, til sølu fyri kr. 300.
*Tlf. 522120*

**BRENNIOVNUR TIL SØLU**
Tasso stoypijarns breniovnur at seta til oljufýring til sølu fyri 3.000,- kr.
*Tel. 315003 eftir kl. 17*

**KAPPRÓÐRARVEITSLA**
Verður í kappróðrarneystinum í Streymnesi leygarkvøldið 6. november kl. 20.00. Seinasta freist at keypa bilett er hóskvøldið 4. november kl. 19.00–21.00 í kappróðrarneystinum.
*H.S.R.*

**VENJINGARBONKUR**
framleiddur í Danmark, til sølu. Uml. 100 kg av vektum fylgja við. Ring og hoyr nærri.
*Tlf. 448323 el. 449185*

**YNSKIST**
Ein góð úthurð ynskist mát. 80x200 ca. ella okkurt ið er har um. Eingin rútur má vera í. Prís ca. 1000 kr.
*Ring 514717, Mourits*

**EITT NÝTT**
ventilatiónsanlegg til sethús til sølu.
*Tlf. 211695*

**04Ð LOPPUMARKNAÐUR**
Vit savna inn til loppumarknað – bæði stórar og smáar lutir. Vinarliga ring um tit hava nakað.
*Tlf. 221108 ella 264070*

**ÁRASØLA (BASARUR)**
Heimaforbundið skipar fyri Árasølu í hølum Frelsunarhersins hósdagin kl. 19. Øll eru vælkomin at stuðla.
*Heimaforbundið*

**103 VINNINGAR**
Send ABC til 1441 At vinna fartelda, fartelefonir, 25 ks. 1 1/2 ltr. Coca Cola, døgurðarættir, 20 før. røst krov, 5 Apex ferðaseðlar. Sí meira á portalinum.
*Bygarfelagið Báran í Árnafirði*

**NOKIA 3410**
Lítið brúkt fartelefon selist fyri einans 500,- kr.
*Ringið 583430 í Vestmanna*

**HANDILSINNBÚGV TIL SØLU**
Vit hava handilsinnbúgv til sølu fyri sera lagaligan prís.
*P/f Valdemar Lützen, tlf. 317920 - Høgni Lützen*

**NIKON COOLPIX 3500**
Lítið brúkt digitalt kamera, 3,2M pixel vid ladara, 64MB Compact Flash, nýtt battarí, USB2 kort lesari (4 í einum). Í sera gódum standi, virkar perfekt. 2100 kr.
*Tlf. 314587*

**NADDODDUR**
Thailendskur matur leygarkvøldið 13. november kl. 19.30. Øll eru vælkomin. Tilmelding áðrenn 11. nov. á
*tlf. 371827*

**CANON IXUS 500**
Digitalt myndatól 5 megapixel 3x optiskt zoom. Fyllur sum ein cigaretpakki. Sera flott kamera. Til sølu fyri 4.500 kr.
*Tlf. 269294*

**FRISØRHJELMUR**
at heingja upp á veggin til sølu fyri 2.500 kr.
*Tlf. 504014*

**TIL SØLU**
Nokia 8310 200 kr. Nokia 6210 200 kr. Nokia 3310 við 9 eyka cower 300 kr.
*Tlf. 318428/257874*

**JÓLABORÐHALD**
Leygarkvøldið 4. desember verður jólaborðhald í Roynhøllini.
Forrættur: Karrysúpan við rækjum.
Høvuðsrættur: Buffét við m.a. stoktum lambskjøti og fleskasteik við øllum, sum hoyrir til.
Omaná: Rísdessert.
Eftir borðhaldið er almennur dansur, har Strange Fruit spælir.
Kostnaður fyri alt tiltakið; 250 krónur. Kostnaður bara fyri dansin: 100 krónur. Tekning í seinasta lagi mikudagin 1. desember.
*Royn*

**UM NAKAR**
eigur nøkur brettir, Møllestue panel ella sokallaðan brendan við, brúkt ella óbrúkt, at selja mær. Vinarliga ring
*tlf. 361167 ella 361767*

**TIL SØLU**
M.C. lyftari til sølu, árg. 2004.
*Tlf. 212322*

**TIL SØLU**
Hvít skjótihurð 73x205 við karmi til sølu fyri 1200 kr. Dupultur radiatorur v/ termostati, h. 56, b. 61, til sølu fyri 300 kr.
*Tlf. 317606/226298*

**KSR-ÁRSVEITSLA**
Ársveitslan hjá KSR verður í Glæmuni 13. november kl. 19.00. Atgongumerki eru at fáa í handlinum hjá Hannemi.
*Kvívíkar Sóknar Róðrarfelag*

**FARTELEFON**
Samsung E-700, 2 mðr. gomul til sølu.
*Tlf. 318522 eftir kl. 17*

**NICORETTE TYGGIGUMMI 4 MG.**
Eg havi nakað av Nicorette tyggigummi, sum eg selji fyri hálvan prís, um tað skuldi verið ein, sum vil leggja av at brúka tubbak.
*Tlf. 313196*

**ER TAÐ NAKAR**
sum vil sleppa av við grót, so ring og vit kunnu tosa um tað.
*Tlf. 423495/222154*

**EIN DKU-5 KÁPIL**
bíliga til sølu. Passar til tær flestu Nokia telefonirnar. Ring og gev eitt boð. Boð undir 350,- ongan áhuga. Nýprísur 500,- kr.
*Tlf. 257141*

**TIL FØROYA Á JÓLUM**
Eg eri blind kvinna, ið mangli ein at fylgjast við til Føroya síðst í viku 50 og til Danmarkar aftur í viku 1. Tú fært ein bíligan ferðaseðil sum takk fyri hjálpina. Ring skjótast tilber
*+45 28708411, Sonja*

**TIL SALG**
Sony Discman, kun brugt en gang. 300,-
*Tlf. 322120/522120*

**JÓLASØLAN 2004**
Árliga jólasølan hjá Føroya Heimavirkisfelag verður í Høllini á Hálsi 27.–28. november. Opið er: leygardagin kl. 10.00–19.00 og sunnudagin kl. 14.00–19.00.
*Nevndin*

**SAMSUNG E700 KLAPTELEFON**
við innbygdari antennu og í lekrum sniðið v/ myndatóli og litskermi. Hevur 9MB dynamiskt memory. Til sølu fyri 2000,- ella hægsta boð yvir.
*Tlf. 255909 aftaná kl. 15*

**STÓRUR MARKNAÐARDAGUR**
verður í Kunoyar skúla og bygdarhúsinun leygardagin 6. nov. frá kl 14.00 til 21.00. Nógvir sølubásar, tombola, fiskibrunnur, bóltkast, loppumarknaður, kafeteria og meira…øll eru vælkomin
*1og 3 flokkur í Kunoy*

**GULDHALSKÆDE**
til mand, 14 krt. elegant ankerkæde, 50 cm. Vægt 50,9 gr. sælges for 4.500,-
*Tlf. 271827*

**FRÍMERKJAMAPPUR**
frá 1977-1984 frá Postverk Føroya og nøkur grønlendsk frímerkir frá 1997 til sølu fyri 1500 kr. Skriva til Sosialin, box 76, 110 Tórshavn.
*Bill.mrk. 1949/2*

**VIKUSKIFTISFERÐ**
virði 2.607 kr. til sølu fyri 2.400 kr.
*Tlf. 316097*

**LOPPUMARKNAÐUR**
verður í KFUM leygardagin 6. november frá kl. 10-17. Vit taka tí fegin ímóti øllum lutum og klæðum leygardagin 30. okt. frá kl. 14-19 í KFUM ella ringj aá tlf. 254116.
*2.a í Hoydølum*

**TIL SALG**
Standerlamper, sølv farvet. m. læselampe til salg for 250,- kr. begge 400,-
*Tlf. 322120/522120*

**HEGN – RESTPARTÍ**
Rullir á 25 mtr. maskinflættað 50x50 mm, galv./pvc, hædd 2 mtr. stólpar galv. T-profil 50/6 mm longd 3 mtr.
*Tlf. 315600*

i
Sosialurin

# Føroyingar minnast mannin í svørtum


*Fríggjakvøldið fara føroyingar at minnast Johnny Cash í Mentanarhúsinum*

**Fríggjakvøldið skipar Mentanarhúsið fyri minniskonsert fyri country-legenduni, Johnny Cash, sum doyði í fjør**

MINNISKONSERT
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Persónliga eri eg ikki nakar Cash-fjeppari, men frontmenninir í føroyska Cash-bólkinum, Petur Pólson og Niels Galan, hava líka síðan Johnny Cash doyði ynskt, at ein minniskonsert varð hildin fyri honum, og nú tóku vit so stig til tað, sigur formaðurin í Mentanarhúsinum, Sólarn Solmunde.

Fríggjakvøldið verður Mentanarhúsið karmur um eina forvitnisliga minniskonsert fyri "The Man in Black", Johnny Cash, sum doyði fyri einum góðum ári síðan.

Petur Pólson, Niels Arge Galan, Jákup Zachariassen, Niclas Johannesen og Uni Árting fara at manna ein føroyskan Johnny Cash-bólk, sum fer at spæla øll hittini hjá fyrrverandi country-stjørnuni.

Sólarn Solmunde vónar , at nógv fólk fara at leita sær í Mentanarhúsið fríggjakvøldið, og hann væntar at síggja fólk í øllum aldri at koma at lurta eftir Johnny Cash, sum gjørdist 71 ár, tá hann andaðist 12. oktober í fjør.

### Kom í svørtum

Johnny Cash gekk altíð í svørtum klæðnum, og tí fekk hann eyknevnið "The Man in Black", og júst svørtu klæðini hava ein forvitnisligan leiklut á tiltakinum fríggjakvøldið. Fyrireikararnir hava gjørt av, at fólk, sum koma í svørtum klædningi og kovboyhatti, sleppa ókeypis inn í Mentanarhúsið.

– Tað hevði skapt ein stuttligan stemning um eitt nú 50 fólk høvdu komið við kovboyhatti, og tað er við tí fyri eyga, at vit lata fólk sleppa ókeypis í svørtum og kovboyhatti, vísir Sólarn Solmunde á.

Fólk, sum ikki koma í svørtum ella kovboyhatti, mugu niður í lummarnar eftir 100 krónum fyri at sleppa inn í Mentanarhúsinum fríggjakvøldið.

Konsertin byrjar klokkan 23, og dyrnar lata upp klokkan 21.30.

### FAKTA - JOHNNY CASH

Johnny Cash varð føddur 26. februar í 1932 í Kingsland, Arkansas. Hann er millum best umtøktu country-tónleikararnar nakrantíð. Maðurin í svørtum upptók fleiri enn 1500 løg. Millum stóru hittini kunnu nevnast, A Boy Named Sue, Folsom Prison Blues, Ring og Fire og I Walk the Line.

Johnny Cash vann í alt 11 Grammy-virðislønir og í 1992 gjørdist hann limur í Rock and Roll Hall of Fame. Frá 1969-71 var hann vertur í "The Johnny Cash Show" á amerikansku sjónvarpsrásini ABC.



## HEILSANIR


**Góðu Borghild og Petur**
Hjartaliga tillukku við 2 og 9 ára føðingardøgunum 3. og 10. november. Takk fyri at tit altíð eru so góð við meg. 1000 mussar og klemm frá
**Bartal**



Forlagið Hellurnar
v/Jústinus Leivsson Eidesgaard · Ovaragøta 1 · 188 Hoyvík
Tel. 22 31 43 · justinus@post.olivant.fo

GER KVETTI
Opel Astra 1600 bíliga til sølu

Árg 97 · km. 85.000
Bilurin er í sera góðum standi og sera okonomiskur í brúki.
Til sølu vegna flyting
Áhugaði vinarliga ringi á tel 44 30 80 ella 74 30 80, ella maila á gudny78@msn.com


Vit takka hjartaliga øllum tykkum, sum vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 15. mai 2004 so hugnaligan og minnisríkan. Tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit og heilsanir.
**Tóra og Helmar Lassen**


**Góða fitta Guðrið**
Hjartaliga tillukku á 7 ára degnum í dag.
**Ynskja mostir, omma og abbi**


**Góði fitti Oddfríður**
Hjartaliga tillukku á 2 ára føðingardegnum 3. nov. Ynskja vit øll
**Arni og Barbara**


**Hygge-Per har fød'sdag**
Hard Core, Rock'n'Roll Suicide Sunshine


**Góða Gudrun**
Hjartarliga tillukku við 5 ára degnum.
**Kærar heilsur beiggi, mamma og pápi**


**Góði elskaði babba**
Hjartaliga tillukku við degnum í dag.
**Ynskir Kristina**


**Góði Thomas**
Omma og abbi vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við 11 ára føðingardegnum 2. nov. Eisini ein heilsan til Súnfríð. Mamma og pápi ynskja tær hjartaliga tillukku við 37 ára degnum 7. nov. Andreas fær eisini eina heilsan.
**Vit á Bjarnoyarvegi 8**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«